# ítróttur

Nr. 62 • leygardagur • 2. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Komandi dystir

**Fótbóltur - Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 03.04 | KÍ-VB | Dagfinn Olsen |
| 03.04 | HB-NSÍ | Páll Augustinussen |
| 03.04 | TB-B36 | Petur Skarðenni |
| 03.04 | EB/S-Skála | Georg Rasmussen |
| 03.04 | ÍF-GÍ | Eiler Rasmussen |

**Hondbóltur - Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 02.04 | StÍF-Kyndil | Heri Petersen/Brandur |
| 02.04 | VÍF-VB | Gunnar Gregoriussen /Dánjal Samuelsen |
| 03.04 | Stjørnan-VÍF | Kristian Johansen/Dánjal Samuelsen |
| 03.04 | Søljan-Kyndil | Hartvig Joensen/Pole Hansen |
| 04.04 | Tjaldur-Neistin | Hartvig Joensen/Pole Hansen |

EB/Streymur-Skála:

# Nýklassikari á Mølini

**Á Skála bíða tríggir útlendskir spælarar framvegis eftir loyvunum, sum skulu til, áðrenn tað ber teimum til at spæla**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Talan verður um ársins fyrsta toppdyst, tá EB/Streymur og Skála hittast á Mølini á Eiði*

Tað eru tvey av liðunum, sum løgdu bragdliga fyri í fyrsta umfarinum, sum hittast á Mølini í morgin. Næstu fótbóltsgrannarnir hjá EB/Streymi eru Skála. Felags fyri bæði liðini er, at tað er ikki fyrrenn í heilt nýggjari tíð, at tey eru vorðin so mikið stinn, at tey av álvara eru við til at seta dám á, har tað er mest spennandi at kappast.

- Vit eru sera væl nøgdir við avrikið og úrtøkuna í Gøtu. Serliga hugaligt var tað, at tað bar okkum til at halda gøtumonnum frá at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Vit vóna, at tað eisini fer at eydnast at halda Skála burtur frá málinum hjá Gunnari á Steig, og at vit eisini hesa ferð fara at spæla okkum til málmøguleikar, sigur EB/-Streyma venjarin Piotr Krakowski.

Páskaaftan fekk Andrzej Pacek so mikið stóran løst í liðbondini í øðrum fótliðnum, at tað ikki bar honum til at spæla í Gøtu, og venjarin hevur ikki serligar vónir um, at tað fer at bera honum til at spæla í morgin. Annar av málskjúttunum í Gøtu, miðverjin Fróði Clementsen, var orsakað av sjúku burturi frá venjing hóskvøldið, men venjarin vónaði, at hann verður tøkur í morgin. Marni Djurhuus var leikbannaður móti GÍ, men hann er nú tøkur aftur.

Veteranurin Finnbjørn Zachariassen var við í venjingunum nógvu tær fyrstu vikurnar, men nú hevur hann í tvær vikur verið darvaður av skaða. Piotr vónar og roknar við, at hann verður tøkur aftur um ikki so langa tíð.

### Tríggir bíða

Á Skála harmast teir um, at tríggir útlendskir spælarar, sum teir rokna við at fáa góða nyttu burturúr, ikki enn hava loyvi at spæla við. Talan er um serbiska málverjan, Vlada Filipovic, serbiska verjuspælaran Milic Corcic og rumenska verjuspælaran Janel Gorgonaru.

Tá ið Skála vann stórsigur á TB, vardi málmansvenjarin, Eugen Voda, málið, og hann verður ivaleyst eisini millum stólpanar á Mølini í morgin.

Skála venjarin, Johan Nielsen, er sjálvandi væl nøgdur við stórsigurin á TB, men hann heldur ikki, at spælið er nóg gott.

- Í løtum hekk samanspælið væl saman og ferðin var ikki so galin. Men avrikið var alt ov óstøðugt. Tað er ikki so undarligt, tí fyrireikingarnar hjá okkum hava verið alt annað enn optimalar. Bæði tí útlendingarnir komu seint, og tí onkrir av hinum spælarunum ikki vandu nakað serligt fleiri av fyrstu vikunum, staðfestir Johan Nielsen.

VB-KÍ:

# VB nýtt álopsvápn úr Serbia

**Spæliloyvið hjá nýggja VB manninum kom upp á pláss hósdagin, so hann verður við í Klaksvík, har heimamenninir vóna at fáa meiri burturúr, enn teir hava fingið ímóti VB tríggjar tær seinastu ferðirnar**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eisini í øðrum umfari eigur KÍ heimavøll. Um úrtøkan ikki er góð, kennist tað sjálvandi einki serligt at eiga heimavøll fleiri ferðir á rað í fyrstu umførunum. Tá ið úrtøkan er góð, kemur heimavøllurin væl við, og áhugin millum viðhaldsfólkini verður beinanvegin stórur, tá ið úrtøkan er stór.

2. páskadag fekk KÍ meiri burturúr, enn teir í fjør fingu á heimavølli ímóti HB. Takið í morgin er at fáa meiri burturúr á heimavølli, enn tað hevur eydnast trý tey seinastu árini, tá ið VB hevur vitjað. Tá hevur tað hvørja ferð verið javnleikur.

Í Klaksvík hevur Ove Flindt Bjerg í hesi vikuni roynt at fáa spælararnar at savna hugsanirnar um avbjóðingina ímóti VB og ikki at hugsa um kloddaríið í steypakappingini og hvørjar avleiðingarnar av tí kunnu fara at verða.

Ovi Nysted er leikbannaður eftir reyða kortið ímóti HB. Jan Andreasen, sum varð settur inn í miðverjuna, tá ið Ovi fór av vøllinum 2. páskadag, er upplagt val til miðverjuna hesa ferð. Eftir at hann í fleiri vikur hevur verið skaddur, hevur Karstin Joensen vant við fullari ferð tvær tær seinastu vikurnar, og tað kann væl vera, at tað verður hann, sum fer at verja KÍ málið í morgin. So fer Mathias Samuelsen at sita á beinkinum saman við ungu monnunum Julian Samuelsen og Kristoffuri Jacobsen, sum vórðu settir inn í 2. hálvleiki ímóti HB.

Tvey tey seinastu vikuskiftini hava vágbingar á heimavølli havt ilt við at finna mótstøðumálið ímóti ÍF. Nú eru formligu viðurskiftini komin í rættlag hjá manninum, sum VB venjarin, John Christensen, vónar skal vera vandamikla álopsvápnið. Nenad Zivanovic hevur vant við í í fleiri vikur, men ikki fyrrenn í fyrradagin komu loyvini upp á pláss.

- Nenad er typiskur serbiskur fótbóltsspælari. Hann hevur góðan bóltførleika, hann er skjótur, og so vóna vit, at hann í dystum verður eins vandamikil undir málinum, sum hann hevur verið í venjingunum, sigur VB venjarin. Hann og hinir í VB ferðalagnum fara úr Vági og til Klaksvíkar í dag, so teir verða væl fyri at spæla í morgin.

## Shearer tekur enn eitt ár

FÓTBÓLTUR
*Rói Danielsen*

Liðskiparin hjá Newcastle United, 34 ára gamli Alan Shearer, hevur nú avgjørt at taka enn eitt ár sum yrkisleikari.

Tann fyrrverandi landsliðsáleyparin hevur annars sagt í alt ár, at hetta var hansara seinasta ár, og at hann fór at gevast í mai. Men Shearer er nú bert 9 mál frá at taka metið sum tann mest skorandi spælarin í Newcastle nakrantíð. Núverandi metið er uppá 200 mál, og tey vóru skorað av tí navnframa Jackie Milburn.

Venjarin hjá Newcastle, Graeme Souness, hevur fleiri ferð roynt at fingið Shearer at halda fram, og nú er líkt til at Souness fær sín vilja.

Nú ið støðan hjá áleyparanum Craig Bellamy er so óviss sum hon er, og tað verður alsamt meira ivi um tann niðurlendska áleyparin Patrick Kluivert, er tað ein lætti fyri Souness, at Alan Shearer heldur fram.